Bogi Eliasen, samfelagsfrøðingur:

Okkum tørvar eitt betri samfelagskjak

Samfelagsfrøðingurin, Bogi Eliasen, bjóðar seg fram gera sítt íkast til, at støðið á politiska kjakinum verður so høgt sum gjørligt. Bogi brennir fyri at gerast politiskur viðmerkjari og hann kennir á sær, at hann kann geva føroyska samfelagnum nakað á hesum økinum

NÝGGJUR VIÐMERKJARI
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

NÝGGJUR VIÐMERKJARI: Nýútbúni samfelagsfrøðingurin, Bogi Eliasen, vil gera sítt íkast til, at støðið á politiska kjakinum í Føroyum verður so høgt sum gjørligt. Komandi tíðina fer Bogi at hugleiða um politisk viðurskifti undir teiginum, Tinghellan, í Sosialinum

Mynd: Jens Kristian Vang

Jógvan Mørkøre og Jóannes Hansen. Tvey kend nøvn, sum seinastu mongu árini hava verið fastir fúsir viðmerkjarar í samfelagsviðurskiftum. Løgtingsvalið 20. januar verður neyvan nakað undantak, og teir báðir fara óivað aftur at gera sítt til, at valkvøldið verður so spennandi og áhugavert hjá lesarum, hyggjarum og lurtarum sum gjørligt.

Uttan at taka nakað frá stóra arbeiðinum hjá Jógvani og Jóannesi seinastu mongu árini, so hava serliga fjølmiðlarnir sett ynski fram um at fáa fleiri viðmerkjarar til at gera sítt íkast til politiska kjakið í Føroyum, so kjakið verður so fjøltáttað sum gjørligt

Ein gjøgnumgangandi trupulleiki á hesum øki er, at stórur partur av útbúnu samfelagsfrøðingunum arbeiða í miðfyrisitingin í dag, og siðvenjan í miðfyrisitingini er, at embætisfólk siga so lítið í fjølmiðlunum sum gjørligt um politisk viðurskifti.

Ein annar trupulleiki er, at nógvir av samfelagsfrøðingunum í Føroyum eru at sígggja í politiskum flokkunum. Leikluturin sum politiskur viðmerkjari útihýsir tá sær sjálvum, tí viðmerkjararnir kunnu jú ikki viðgera seg sjálvar. Í londunum rundan um okkum eru politisku viðmerkjarar ein týðandi partur av fólkaræðnum, men í Føroyum trýtir tað við slíkum fólki.

Havnarmaðurin og nýútbúni samfelagsfrøðingurin, Bogi Eliasen, ætlar at taka av ynskinum frá fjølmiðlunum um fleiri viðmerkjarar, og bjóðar seg nú fram at gera viðmerkingar til ymisk samfelagsviðurskifti. Komandi tíðina fer Bogi Eliasen at hugleiða um ymisk politisk viðurskifti undir teiginum, Tinghellan, í Sosialinum

Kennir ábyrgd

Bogi Eliasen er nýútbúgvin samfelagsfrøðingur frá lærda háskúlanum í Árhus. Hóast siðvenjan er, at samfelagsfrøðingar leita sær starv í miðfyrisitingini ella í privata vinnulívinum, so er hetta ikki einasti møguleikin í huganum hjá Boga í løtuni. Hann vil royna seg sum viðmerkjara og dylir ikki fyri, at hetta er er eitt hjartamál hjá sær.

Hann heldur ikki, at tað er ein mótsetningur at arbeiða í miðfyrisitingini og samstundis gera fakligar viðmerkingar og metingar um samfelagið, men tað krevur hógv, soleiðis at partapolitiskar áhugamál ikki sníkja seg í viðgerðina og at viðmerkingar ikki einans verða gjørdar fyri at tæna tí stovninum ein arbeiðir fyri. Júst hetta kundi verið við til at loyst trupulleikan við at ov fáir viðmerkjarar eru, og harvið kunna lyft kjakið upp á eitt hægri støði.

Men tað krevur greiðar reglur, soleiðis at trúvirðið ikki fer. T.d. átti einki at verið í vegin fyri, at ein samfelagsfrøðingur í miðfyrisitingini luttekur á jøvnum føti í tí breiða almenna kjakinum, um viðkomandi ikki kemur nágreiniliga inna á øki, sum viðkomandi persónur arbeiðir við dagliga.

– Eg kenni eina ávísa ábyrgd á hesum økinum. Eg havi fingið bæði fólka- og studentaskúlan í Føroyum, og nú, eftir lokna útbúgving, vil eg geva nakað aftur. Eg føli eisini á mær, at eg kann geva nakað og tí velji eg at bjóða meg fram, greiðir Bogi Eliasen frá.

Hann leggur dent á, at hann hevur ongar ætlanir um at sjálvnevna seg sum ein serfrøðing á øllum økjum. Høvuðsuppgávan hjá einum viðmerkjara er at elva til kjak um ymisk evni og ikki gera seg til serfrøðing á teimum ymisku økjunum, vísir hann á

Bogi ætlar at leggja dent á, at fakligi málburðurin víkir fyri gerandismálburðinum, tí sum hann málber seg, so er eingin orsøk at skriva nakað sum fólk ikki skilja.

Setrið trýst

Spurdur, um hvørjar orsøkirnar eru til, at tað er so torført at finna fólk at gera viðmerkingar til týðandi samfelagslig mál í Føroyum, svarar Bogi, at eitt svar liggur í støddini av føroyska samfelagnum. Hann heldur, at føroyingar kunnu ikki sammeta seg við eitt Danmark á hesum øki, tí føroyska samfelagið er minni í vævi, og tí eiga vit at finna okkara egnu skipanir á økinum.

– Næsti trupulleikin liggur í, at Fróðskaparsetrið er ov veikt og ov tengt at aktuella løgtingsviljanum til fígging. Tí hevur Setrið eitt politiskt trýst liggjandi á sær, í mun til sín kritiska eygleiðarlut. Harumframt er samfelagsdeildin á Setrinum alt ov lítil til at hava henda leiklut einsamøll. Fyri samfelagskjakið sum heild, hevði tað verið serstakliga gott við einum sterkari Fróðskaparsetri, men tað krevur fígging, greiðir Bogi frá.

Hann heldur, at breiðar politiskar langtíðarsemjur høvdu betra munandi um støðuna. Hinvegin er tað kanska ov nógv at krevja av Løgtinginum, at tað skal fíggja ein stovn, sum skal eygleiða tað. Fróðskaparsetrið átti at verið til at ment kjakið í Føroyum, men stovnurin er møguliga bangin fyri at taka kjak upp um politisk evni, tí so kann fíggingin vera í vanda.

Hann vísir á, at Jógvan Mørkøre hevur verið nógv frammi sum viðmerkjari, men tað hevur kanska heldur verið tí, at hann sjálvur hevur mett tað verið neyðugt, heldur enn at tað hevur verið ein tilætlaður leiklutur frá Fróðskaparsetrinum.

Bogi heldur annars, at støðið á teimum viðmerkjarum, sum eru í dag, er høgt. Hann fýlist kortini á støðið í føroysku fjølmiðlunum. Bogi sigur, at fjølmiðlarnir í Føroyum áttu at raðfest øðrvísi, og sett meira tíð av til "research".

– Eg kann nevna eitt nú tíðindablaðið Jyllandsposten, sum setir fast tveir samfelagslesandi at gera bakgrundsarbeiði fyri journarlistarnir. Tað verður sjálvsagt altíð ein spurningurin um raðfesting hjá tíðindaleiðarunum, men vit mugu hava fyri eyga, at fjølmiðlarnir hava í dag ein ómetaliga stóran týdning fyri hvørjum støði samfelagsliga kjakið er á, sigur Bogi Eliasen

Nøkur aðalmál

Bogi Eliasen hevur royndir sum viðmerkjari á øðrum bløðum, men komandi tíðina verður tað Sosialurin,ið fer at gera dælt av hansara evnum. Bogi ætlar serliga at leggja seg eftir at viðgera politisku skipanina í Føroyum.

Her verður serliga hugsað um trupulleikar, sum eru millum løgtingið og fyrisitingina í dag. Bogi hevur eisini sett sær fyri at viðgera føroyska valskipanina og valdømini í síni heild. Hann er av teirri áskoðan, at neyðugt er at umskipa valdømini, so tey koma at hóska til kommunubygnaðin í landinum, ella umhugsa at gera Føroyar til eitt valdømi, sum eina avleiðing av hesum broytingum.

Bogi sigur at enda, at viðurskiftini við ES og uttanríiksmál í síni heild er eisini eitt av hansara hjartamálum. Í komandi Tinghellum ætlar hann at nema við viðurskiftini millum Føroyar og ES. Hann heldur, at ov lítið verður kjakast føroysku støðuna til ES, og ikki minst nú, tá ES stendur fyri umfatandi bygnaðarbroytingum.

Eitt styrkt Løgting

TINGHELLAN/-KRONIKKUR
Bogi Eliasen, cand.scient.-pol/samfelagsfrøðingur

Í hesum døgum fer valstríðið at harðna. Valstríðið um hvør skal sita á løgtingi og umboða Føroya Fólk komandi valskeið, sum í mesta lagi er fýra ár.

Vit hava eina frælsa demokratiska skipan, og tí hava vit eitt frælst val, har øll valbær kunna bjóða seg fram í flokki ella sum einstaklingur. Demokratiskar skipanir í okkara parti av heiminum verða ofta sagdar at vera trýbýttar eftir læru Montesquieus í ávíkavist lóggevandi, útinnandi og dømandi valdi, sum skula verða javnmett og leys hvør av øðrum, og soleiðis halda hvørjum øðrum í oyrunum. Henda meginregla er idealistisk og kanska ógjørlig at seta í verk, men kann verða sett sum mál. Hjá okkum ber ikki til enn at hugsað í tríbýti, tí tann dømandi parturin, ikki enn íð hvussu so er er føroyskt málsøki.

Men vit hava tað útinnandi og lóggevandi valdið á yvirtiknum málsøkjum. Her, sum í okkara grannalondm sæst, at lóggevandi og útinnandi valdið politiskt eru tætt knýtt hvørt at øðrum. Tað er vanligt, at topparnir í samguflokkunum fara í stjórnina, sum er tað útinnandi valdið. Soleiðis eru flokkarnir umboðaðir, bæði í útinnandi og lóggevandi valdinum, og verður tingsamgongan og stjórnin, sum situr á útinnnandi valdinum, tæt knýtt.

Stjórnin hevur miðfyrisitingina

Um okkara leiðir er vanligt, at miðfyrisitingin tænir stjórnini, tað vil siga at ráðharrar eru politisku leiðararnir. Her verður somuleiðis roknað við, at miðfyrisitingin vísir ráharrunum álit ella loyalitet, tvs. at tað ikki verður arbeitt ímóti ráðharrunum. At hetta ikki er bara sum at siga tað, sæst m.a. í Onglandi og USA, har allur toppurin av umsitingini verður skiftur út aftaná val/stjórnaskifti, soleiðis at samgongan veit, at har sita fólk við loyaliteti.

Løgtingið hevur einki

Aðrastaðni er vanligt, at lóggevandi tingið hevur serkunnleika bygdan inn í skipanina. T.d. í Danmark fær ein fólkatingslimur pening til at seta hjálparfólk til tingarbeiðið. Harafturat hevur Fólkatingið eina hjálpandi fyrisiting.

Her standa vit á berum í Løgtinginum. Løgtingsskrivstovan er sera lítil og fáment, og hevur als ikki orku til at hjálpa øllum løgtingslimunum at tilevna lógaruppskot, gera langtíðarætlanir o.s.fr. og tað er ein veikleiki í okkara fólkaræði. Stýrisskipanarlógin letur upp møguleikan fyri minnilutastjórnum, men ein minnilutastjórn krevur, at andstøðan hevur orku til at arbeiða og tilevna lógaruppskot og ætlanir, sum kunnu bjóða landsstýrinum og miðfyrisitingini av. Tað er ikki støðan í dag.

Principielt kann andstøðan brúka miðfyrisitingina, men tað elvir til fleiri trupulleikar. T.d. hevur miðfyrisingin ikki óavmarkaðar miðlar, og tí skulu uppgávurnar raðfestast. Um ein fyrispurningur t.d. er frá andstøðupolitikkara um at tilevna eitthvørt lógaruppskot og Landsstýrismaðurin samstundis skal hava eitt lógaruppskot gjørt liðugt, hvat verður so hægri raðfest? Tað er ikki nakar ivi um, at landstýrismaðurin stendur fyrst. Og tað er eisini í lagi. Og hvat um miðfyrisitingin samstundis skal tilevna eitt uppskot fyri landsstýrismannin og eitt mótuppskot fyri andstøðuna, er tað ikki trupult?

Check and Balances í amerikonskum anda.

Løgtingið og Landstýrið skulu eisini helst verða principielt atskild, og ansa hvør øðrum. Tí skulu tey eisini hava hvør sín serkunnleika. Í einari liberal demokratiskari check and balances, (tað merkir at stovnarnir kanna og javnviga hvønn annan) hugsan, sum m.a. hevur røtur í Grundlógini í USA, skulu politisku stovnarnir halda skil hvør á øðrum. Tað ber ikki til, um miðfyrisitingin skal tæna báðum pørtum.

Løgtingið skal hava meira serkunleika, finst hann?

Hjá okkum er ein trupulleiki, at vit hava avmarkað fólk til taks. Hava vit fólk til eitt styrkt Løgting, og hvussu skal Løgtingið skipast?

Ein máti er, at hvør løgtingslimur fær fígging til at seta t.d. eitt heilt ella hálvt ársverk aftrat sær. Soleiðis fær løgtingslimurin loyala hjálp til tingarbeiði sítt, og velur sjálvur hvør skal setast. Størru flokkarnir kunnu soleiðis gera sekretariatir, um teir savna hesi fólk. Harvið verða flokkarnir eisini styrktir, soleiðis at teir kunnu arbeiða meira støðugt og proffesionelt við langtíðarætlanum, eisini ímillum val.

Til ber eisini at økja um umsitingina í løgtinginum, soleiðis at tað verður eitt felags sekretariat, sum skal hjálpa tinglimunum. Her fæst kanska ein størri fakkunnleiki, men loyaliteturin millum tann einstaka politikaran og hjálparfólkini, verður ikki sum í fyrra mátanum. Flokkarnir í sjálvum sær verða ikki styrktir og tað gevur ikki møguleikan at sita og evna langtíðarætlanir saman við einum ella fleiri fleksloyalum hjálparfólkum. Har afturat kann umhugsast, um flokkarnir skulu beinleiðis tillutast størri fíggjarliga orku, fyri at styrkja um flokkarnar, óheft av beinleiðis løgtingsarbeiði.

Langtíðarætlanir

Ofta verður havt á lofti, at kompromisir og breiðar langtíðarætlanir ikki verða gjørdar í føroyskum politikki, tí eitt nú í Danmark er vanligt at hava breiðar politiskar semjur um stór mál, soleiðis at alt ikki skal broytast, hvørja fer ein nýggj stjórn kemur framat.

Okkara flokkar hava slett ikki kapasitet at arbeiða við tílíkum ætlanum, og andstøðan ella løgtingið, sum heild, hevur heldur ikki orku at koma við alternativum lógaruppskotum í mun til tað, sum kemur frá Landsstýrinum.

Um vit í Føroyum ynskja eina professionella politiska skipan, sum kann samanberast við okkara grannalond, krevur tað at løgtingið og flokkarnir verða styrkt munandi. Sjálvandi kostar tað at styrkja løgtingið, men spurningurin er, um tann peningurin ikki verður skjótt afturvunnin, tí at politiska skipanin gerst betri og meira seriøs. Mín meting er, at verandi skipan ger, at vit ikki koma uppá eitt støði har breiðar semjur, langtíðarætlanir og minnilutastjórnir koma upp á tal, tí at Landsstýrið er alt ov sterkt í mun til Løgtingið. Harvið fer bæði løgtingsins eftirlitspartur og tann reelli møguleikin fyri mótspæli frá andstøðuni, fyri skeyti. Tað kann leggjast aftrat, at ynskja vit eitt nýmótans vælferðarsamfelag, mugu vit gjalda tað tað kostar at hava eina professionella politiska skipan. Hetta at ganga og siga, at okkara politikarar eru serstakliga býttir og fámentir, førir ikki til nakra loysn og gevur heldur ikki tí einstaka politikaranum, sum vil, møguleikan at arbeiða.

Vit hava nakrar sera álvarsamar bygnaðartrupulleikar og teir skula loysast, um politikkurin skal professionaliserast. Okkara politikkarar eru ikki í miðal býttari enn aðrastaðni, men okkara skipan er ikki nóg góð. Um støðan veruliga er tann, at okkara politikkarar eru býttari enn aðrastaðni, so má spurningurin verða, hví fáa vit ikki betri fólk inn í politikk?

Tinghellan – kjakforum í Sosialinum

Politiska kjakið er nú í hæddini. Upp undir val er politiska kjakið í Føroyum sera virkið við valsendingum, greinum og fundum. Men enn er tørvur á einum kvalifiseraðum kjaki ímillum val og ímillum onnur enn politisk valevni.

Sosialurin hevur fyrr roynt Tinghelluna sum eitt forum fyri samfelagsligt kjak og viðmerkingar frá fólki við sakkunnleika og lívsroyndum. Tað vísir seg tíverri trupult at fáa skipað fyri hesum.

Nú Tinghellan á Tinganesi skal mannast av nýggjum við kvinnum og monnum, ið vilja gera sítt besta at stýra landinum, fer Sosialurin at gera sítt besta at manna ta fakligu og kjakligu Tinghelluna.

Hesuferð er tað Bogi Eliassen, samfelagsfrøðingur, sum leggur fyri við eini grein um valdið hjá løgtinginum. Hann fer eisini í komandi Tinghellum at skriva aðrar greinar. Kári á Rógvi, ið fyrr hevur staðið á helluni, fer eisini at siga sítt, umframt vónandi onnur.

Týsdagin fara vit at kunngera størstu valkanning nakrantíð, og hon verður grundarlag undir fleiri analysum. Jóannes Hansen og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingar, standa fyri hesum eygleiðingum.

Málið hjá Sosialinum er at skapa uppaftur betri karmar fyri kjakinum í Føroyum við rúmi fyri analysum, kronikkum og klummum. Ella við vanligum orðum skilagóðum og upplýsandi kjaki og greiningum frá fólki, sum vita, hvat tey tosa um.

Vit vóna, at fólk, sum vilja vera við at manna Tinghelluna í framtíðini, eisini gera vart við seg. Tað krevst sjálvsagt vit og skil og idelalisma, og betri pengar eru helst at tjena við at skriva innanhýsis upprit, men føroyska samfelagið tørvar í hægstu grad, at dugnalig fólk geva okkum at dugnandi kjak.

Sosialurin vónar, at hetta valskeiðið, sum kemur, fer at fáa ágóðan av einum mentum debattforummi, ið byrjar við hesi Tinghelluni hjá Boga um tað skjótt nývalda tingið.

Sosialurin